TING-HELLAN

# stórliga yvirmett



*Veruleikin er heldur, at ES ikki er so sterkt, sum føroyingar ofta halda, og at ES-grundlógin heldur ikki broytir Europeiska Samveldið serliga nógv samveldisvegin*

ES-grundlógin víðarifórir tey donsku fyrivarnini, ið stava frá sokallaðu Edinburgh-samtyktini móti endanum av 1992. Kortini verður tað í sambandi við ES-grundlógina víst til "vandan" fyri, at fyrivarnini verða sett til atkvøðu og avtikin í somu atløgu, sum ES-grundlógin verður samtykt. Fyrivarnini snúgva seg um samveldisborgaraskapin, evruna og ein part av samstarvinum um rættarlig og innaru mál (rættarliga fyrivarnið) og tann partin av felags uttanríkis- og trygdarpolitikkinum, sum hevur við verjuna at gera (verjufyrivarnið). Men nú vísir tað seg kortini, at fyrivarnini ikki verða við á fólkaatkvøðuni, sum skal verða í Danmark 27. september komandi. Sostatt er tað ikki einans formliga greitt, men eisini politiskt avgjørt, at ES-grundlógin — fyribils í hvussu er — ikki nertir við hesi umstríddu øki, har Danmark hevur fyrivarni.

Skuldi Danmark samtykt ES-grundlógina og seinni avtikið fyrivarnini, so verða avleiðingarnar ongar fyri spurningin um, hvørt samveldisborgaraskapurin fer at troðka statsliga ríkisborgaraskapin til viks. Orsøkin er, at fyrivarnið um samveldisborgaraskapin ongan týdning hevur longur, tí tað er staðfest í verandi sáttmálum og eisini í ES-grundlógini, at vanligi ríkisborgarskapurin er yvirskipaður samveldisborgaraskapinum, ið einans supplerar veruliga statsliga borgaraskapin.

Viðvíkjandi gjaldoyrafelagsskapinum (evruni), so kunnu Føroyar koma at verða noyddar at velja evruna sum gjaldoyra, tí politiskur vilji er neyvan til egið føroyskt gjaldoyra, eins og vilji og praktiskur møguleiki heldur ikki er til, at føroyingar sjálvir sita eftir við donsku krónini.

Viðvíkjandi spurninginum um rættarliga fyrivarnið, so fer partur av rættarliga samstarvinum — sum politi og revsirættarskipan — yvir til at verða regulerað beinleiðis av ES (yvirstatsligt), og tí kann ein donsk avtøka av hesum fyrivarni ávirka Føroyar óbeinleiðis.

At enda fær ein avtøka av verjufyrivarninum heldur ikki stóra ávirkan á Danmark ella Føroyar, tí eisini undir ES-grundlógini kemur hetta økið at verða millumstatsligt; t.e. at ES-stovnar ikki fáa beinleiðis løggevandi ella dømandi vald á økin-um, sum heldur verður samskipað sum eftir eini vanligari sáttmálaskipan.

Kortini er rætt, at nýggja ES-grundlógin eftir sínum innihaldi togar ES eitt sindur nærri eini samveldisstatsligari skipan enn nú. Hetta sæst serliga aftur í tí, at ES-tingið verður styrkt munandi og nú fer at sita við løggávuvaldinum í ES javnt við Ráðið. Eisini er vert at nevna, at fleiri øki, eitt nú innan t.d. rættarliga samstarvið, nú verða yvirstatslig heldur enn millumstatslig. Harafturat verður felags uttanríkis- og trygdarpolitikkurin styrktur, m.a. við einum felags uttanríkisráðharra og eini felags uttanríkistænastu, og málsetningurin at virka fram móti einum felags europeiskum verjupolitikki verður førdur víðari. Men hetta broytir tó ikki, at uttanríkis- og trygdarpolitiska økið framvegis kemur at liggja á millumstatsligum heldur enn yvirstatsligum støði, og at limalondini tí við løggevandi- og dømandi valdinum framvegis avgera rættar-støðuna endaliga innlendis. Tí fáa ES-stovnar ikki beinleiðis vald á hesum øki, eins og á gomlum yvirstatsligum økjum, ið hava at gera við búskap og handil.

Samanumtikið kemst ikki uttanum, at fráveran í ES-grundlógini av (samveldis-) statsligum eyðkennum er nógv sjónligari enn hjáveran av somu. ES og ES-grundlógin hava í veruleikanum ongi av týdningarmestu statsligu eyðkennunum.

Skal ES-grundlógin broytast, mugu øll limalondini vera samd. Slíkt ber boð um, at øll limalondini framvegis varðveita sítt fullveldi óskalað.

Klassiskt statseyðkenni er eisini, at ein statur hevur rætt til við tvingsli at fremja viljan hjá sínum stovnum. Heldur ikki hetta vald hevur ES í løtuni og fær tað heldur ikki við ES-grundlógini. Skulu ES-stovnarnir tvinga sín vilja ígjøgnum, kunnu teir einans gera tað við at heita á myndugleikarnar hjá limalondunum. Sama er galdandi fyri yvirstatsligu økini — har ES annars løggevur beinleiðis og tí kann minna eitt sindur um ein stat. Sjálvt ikki við felags løgreglusamstarvinum fær ES nøkur tvingsilsamboð.

Til seinast kann verða víst til fíggjavaldið sum ein av heilt avgerandi heimildunum, ið einhvør stjórn má hava ræði á, um talan skal vera um nakran veruligan statsmyndugleika. Eisini í tí sambandi er ES ógvuliga veikt. ES hevur ongan veruligan rætt at krevja upp skatt og hevur einans eitt fíggjarligt grundarlag, ið svarar til gott 1 % av BTÚ hjá limalondunum. Heldur ikki hetta veika fíggjarliga grundarlag verður broytt nevnivert við ES-grundlógini.

Alt hetta vísir, at ES er og við "grundlógini" framvegis verður nógv meira ein sáttmálaskipan enn ein samveldisstatslig skipan.

Eisini í aðrar mátar hevur ES-grundlógin rættiliga lítið uppá seg sum grundlóg. Neyðugt er bert at nevna longdina, sum uttan fylgiskjøl er um hálvtannaðhundrað síður við á leið hálvfimthundrað greinum. Hon er harvið so long, at hon greitt brýtur viðurkendar grundreglur fyri grundlógarsmíð, um ætlanin er tann vanliga at skapa eitt skjal, ið hevur høga tign bæði sum lóg og ímynd. Longdin ger, at vanligir borgarar í Europa ikki koma at kenna innihaldið í skjalinum ella koma at virða tað sum ímynd av teirra politiska samfelag. Men ES-grundlógin fær ikki annað enn verið øgiliga long, tá hon í roynd og veru bara er enn ein nýggjur sáttmáli, sum samanskrivar og ruddar upp í teimum undanfarnu sáttmálum fyri Europeiska Samveldið og tillagar mannagongdir o.a. í sambandi við upptøku av alsamt fleiri limalondum.

At kanningar í europeisku londunum vísa, at vanligir borgarar lítið og onki kenna til ES-grundlógina, bendir á tað sama og prógvar eisini, at Europeiska Samveldið framhaldandi er eitt projekt fyri elituna og tí ikki kann stovna nakran europeiskan stat á fólkaræðisligari grund.